## SUMMARFRÍ

Tað verður hervið gjørt kunnugt, at býráðsskrivstovan vegna summarfrí verður stongd fyri allari avgreiðslu frá mánadegi 10. juli til og við fríggjadegi 28. juli 2000.

*Fuglafjørður tann 28. juni 2000*
**Fuglafjarðar býráð**

## DANNY TRANSPORT

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

Tlf. 319192

## KN tag

Det bedste over hovedet...
- også på Færøerne

- Tagpapdækning
- Efterisolering med Rockwool
- Tagrenoveringer
- Tagreparationer
- Renovering af skiffertage

**Op til 15 års garanti**

Medlem af DTBs Garantifond

KN Tagdækning A/S

www.kn-tag.dk - E-mail: post@kn-tag.dk
Bredalsvigvej 1 • Humlum • 7600 Struer
**Tlf.** 0045 **97 86 17 33** •
Fax 0045 97 86 12 05
Kimsvej 1 • 7500 Holstebro
**Tlf.** 0045 **97 40 19 33**
Industrivej 15 • 7700 Thisted
**Tlf.** 0045 **97 92 61 33**
Ring og få et godt tilbud.

Kontakt vore medarbejdere på taget hos Ide Møbler, Tórshavn, i juni og juli

## Um hóskandi boð fæst selja vit ein Toyota Hilux 4x4 Pick-up Extra-cab við skaða

Bilurin er skrásettur 04/06-1998, hevur koyrt 42.000 km. og kann síggjast hjá P/f Reyni Service í Hoyvík.

**REYNI SERVICE**




Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040

Sosialurin - 311820

## Frá Hotel Norð

**Leygardagin er stongt vegna veitslu.**

**Opið verður aftur við døgurða kl. 12.00 sunnudagin.**

**Døgurðin er fersk suppa, oksasteik og heimagjørd dessert.**

**Hotel Norð**

FO 750 Viðareiði - Tel. 451244 - Fax 451245

Sosialurin - 311820

## GÓÐKENDUR ROTTANGI úr glasfipuri




Prísur 6.500,-

team 85 • 31 65 11

**ALUMINIUM & PLASTVIRKIÐ P/F**
**www.plastvirki.fo**

**Umsiting:**
Tel 31 87 96
Fax 31 87 46
Í Svanga 23
Postboks 199
FO-110 Tórshavn
e-mail: plastvirki@plastvirki.fo

**Verkstaður:**
Norðagøta

## Kunngerð

**Í sambandi við søluloyvi á ólavsøku 2000:**

Loyvt er ikki at selja serpentin sprayblikk, vørur í ílati av blikki ella glasi, cowboyhattar úr plastikk- ella pappírstilfari og heldur ikki seyðarhøvd.

Fyri tær vørur, ið loyvt er at selja, verður víst til løgtingslóg um afturlatingartíðir fyri handlar, lýst í kunngerðarblaði nr. 14, 4. juli 1991.

Fyri aðrar sølubúðir, ið ikki eru umfataðar av afturlatingarlógini, verður víst til tey loyvi, ið Føroya landfúti hevur útskrivað til hesar búðir. Mint verður á, at loyvini mugu ikki latast øðrum.

Tórshavnar kommuna áleggur øllum, ið hava kiosk ella aðra sølubúð, at hava nóg mikið av ruskíløtum og støðugt at halda økið uttan um búðirnar ruddiligt.

**UPP- OG AFTURLATINGARTÍÐIR Á ÓLAVSØKU 2000**

Vísandi til løgtingslóg um afturlatingartíðir fyri handlar § 4, stk. 3, skal við hesum verða boðað frá, at handlar í Tórshavnar kommunu í sambandi við ólavsøkuna kunnu hava opið 27. juli til kl. 21.00, 28. juli til kl. 02.00 og 29. juli frá kl. 14.00 til kl. 02.00.

*Tórshavnar kommuna*



## máling & gólv

**SUMMAR TILBOÐ**

Stormshield 1. floks betongmáling 10 ltr.
BERT 499,-

Johnstone's træverja timbershield 5 ltr.
BERT 399,-

Reyð rustverjandi takmáling 5 ltr.
BERT 299,-

**máling & gólv**

Við Landavegin • Tórshavn
Tel. 31 60 66

## DAGLIGUR LEIÐARI

Søkt verður eftir dagligum leiðara til telduhandilin 3-aran Electronic

Uppgávurnar hjá dagliga leiðaranum verða í høvuðsheitum fylgjandi:

- **Dagligur rakstur av handlinum**
- **Innkeyp av vøru**
- **Umsiting av handlinum**
- **Marknaðarføring**

*Vit vænta av tær, at tú:*

- Hevur holla vitan innan KT og handilsrøkt.
- Dugir væl at arbeiða saman við øðrum, men samstundis dugir at arbeiða sjálvstøðugt.
- Kann vera virkin í einum leiðarabólki.
- Kann fyriskipa arbeiði hjá øðrum.
- Er ein fyrikomandi persónur.

*Vit kunnu bjóða tær:*

- Eitt sera spennandi arbeiðspláss, har tú er partur av einum dynamiskum starvsliðið.
- Møguleikan at royna teg innan øll økir í handlilsvinnuni.
- Møguleikan at standa á egnum beinum og vera við at byggja ein handil upp frá grundini.

Løn sambært avtalu.

Heldur tú at hetta er júst nakað fyri teg, og hevur tú hug at royna tínar veingir innan handilsvinnuna saman við okkum, send eina umsókn til :

3arin ELECTRONIC

Postmoga 1057-1058 · 110 Tórshavn · Att: Hans/Gissur
Tel 35 35 35



FØROYA LANDSSTÝRI

## Endurlýsing

## Løgfrøðingur til Fiskimálastýrið

Søkt verður eftir løgfrøðingi til áhugavert og fjølbroytt starv í Fiskimálastýrinum.

**Starvið**
Høvuðsuppgávan hjá løgfrøðinginum verður at veita løgfrøðiliga ráðgeving og at hava løgfrøðiliga málsviðgerð innan fiskivinnu- og sjóvinnumál, herundir bjarging og tilbúgving. Starvið er skipað sum stápur á Aðalskrivstovuni.

**Førleikakrøv**
Kravt verður, at umsøkjarin hevur:
- løgfrøðiliga útbúgving
- góðan kunnleika til føroyskt og enskt mál
- góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni

Fyrimunur er, um viðkomandi hevur starvsroyndir innan økið.

**Treytir**
Setanartreytir og løn verður sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag. Setanaraði er Fiskimálastýrið og stovnar undir tí, umframt onnur aðalstýrir og løgmansskrivstovan.

**Umsókn**
Umsóknir, við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu vera Fiskimálastýrinum í hendi í seinasta lagi týsdagin 1. august 2000.

Umsóknir skulu sendast til:

**Fiskimálastýrið**
Postboks 347
FO-110 Tórshavn

Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum fáast frá Kaj P. Mortensen, aðalstjóra á tlf. 353030.

## Lærarastørv
## Runavíkar Kommunuskúli

Til skúlaárið 2000/2001 verður søkt eftir 1 lærara. Starvið, sum er tíðaravmarkað, er lønt samb. avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1. til 27.4.

1. Í tímatalvuni eru m.a. lærugreinirnar enskt í framhaldsdeildini, gentuítróttur og stuðul.

Umsóknirnar skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi 15/7-2000.

Nærri fæst at vita hjá skúlastjóranum tlf. 447331 ella tlf. 447956.




**Runavíkar Skúlanevnd**
v/ Jákup Hansen
Sýnarvegur
FO 625 Glyvrar

## Undirvísingar- og Mentamálastýrið
**Vinnu- og Miðnámsskúladeildin**

# Skrivstovufólk

**Starvið**
Í sambandi við at eitt av starvsfólkum okkara er farið úr starvi, er eitt áhugavert og fjølbroytt skrivstovustarv leyst at søkja í Vinnu- og Miðnámsskúladeildini við starvsstaði í Yrkisdeplinum.

Høvuðsuppgávurnar verða m.a. at:
- Fyrireika ymiskar arbeiðsuppgávur í Yrkisdeplinum (í sambandi við lærusáttmálar, lærupláss-góðkenningar, tilmelding til skúlar v.m.)
- Journalisering
- Avgreiða samsýningar viðv. próvdøming/metingardómarum
- Skriva yrkisprógv
- Telefon- og kundatænasta

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a. at umsøkjari hevur:
- Útbúgving og møguligar royndir í skrivstovuyrkinum ella øðrum, ið kann javnmetast við hetta
- Góðan kunnleika í nýtslu av edv (windows, word, excel)
- Góðan kunnleika til føroyskt
- Góð samstarvsevni
- Førleika at arbeiða sjálvstøðugt

**Vit bjóða**
Starvið er spennandi við nógvum samskifti inn- og úteftir.

Sjálvstøðugt starv við møguleikum fyri bæði persónligari og fakligari menning.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um alt aðalstýrið og allar deildir/stovnar tess.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum o.ø. skulu sendast til:

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið**
Att: Yrkisdepilin
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 24. juli 2000 kl. 15.00.

Starvið verður at seta skjótast til ber.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Petur Oluf Hansen, fyrisitingarleiðara, tlf. 355050

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.

Í **aðalstýrinum** eru stápsfunktiónir innan m.a. løgfrøði, búskap, kunningartøkni og fyrisiting. Fyriskipanin er býtt í 3 deildir – fólkaskúladeild, vinnu-/miðnámsskúladeild og mentamáladeild – sum stápsfunktiónirnar veita ráðgeving til, umframt til aðalstjóran og landsstýrismannin.

**Yrkisdepilin** er ein sjálvstøðug fyrisitingareind í Vinnu- og Miðnámsskúladeildini undir Undirvísingar- og Mentamálastýrinum, og fyrisitur í høvuðsheitum arbeiðsmarknaðar- og yrkisútbúgvingarmál. Fyrisitingarliga er Yrkisdepilin skipaður í eina yrkisnevndafyrisiting og eina ráðsfyrisiting, sum eisini fyrisitur mál hjá stýrinum.

**Toll- og Skattstova Føroya**
**Streymoyar øki**

## Summarfrí

Vegna summarfrí frá og við 17. juli til og við 4. august 2000 verður avgreiðslan Smyrilsvegur 7 bert opin frá kl. 11.00 til kl. 13.00 nevnda tíðarskeið.

Tollbúðin/avgreiðslan og posttollurin hava opið sum vanligt, eins og telefonin til teirra svarar.

**Toll- og Skattstova Føroya**
**Streymoyar Øki**

## Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Peugeot 106 1.5 XND Diesel
**Árg.:** 1995
**KM:** 87.000

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú og kann síggjast hjá P/f Meinhardt Arge.

TRYGGINGARFELAGID FØROYAR

Fróði Müller
tlf. 345600 · lokal 728
Fartlf. 283892
at hitta millum kl. 13 og 15

## Pedagogur

Søkt verður eftir pedagogi, m/k til næmingaheim skúlans í Sernámsdeplinum.

Starvið er avloysarastarv frá 1. september 2000 til 1. mai 2001.

Løn og arbeiðstíð sambært sáttmála ímillum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið.

Nærri um starvið fæst at vita frá Sigrid Winther, leiðara, tlf. 315934 ella í Sernámsdeplinum, tlf. 314522.

Umsóknir við prógvi v.m. skulu vera Sernámsdeplinum í hendi í seinasta lagi mánadagin 24. juli 2000.

**Sernámsdepilin**
á Frælsinum 32
100 Tórshavn

**VEGG SAGING**
Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.

**HOL SAGING**
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

**GÓLV FRESING**

**GÓLV SLÍPING**

**GÓLV SAGING**
Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

**FØROYA BETONG SAGING** v/Hjaltur Tausen

Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

Sosialurin - 311820